# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Per Skov Christensen:

## 25 ára starvsdag sum politistur




Týsdagin 1. februar 2005 hevði Per Skov Christensen politistur í Havn 25 ára starvsdag.

Per er 51 ára gamal føddur í Viborg 9. august 1953 og uppvaksin á Amager.

Hann er útbúgvin múrari og arbeiddi sum múrari í Keypmannahavn, til hann sum 26 ára gamal gjørdist politistanæmingur á politiskúlanum í Keypmannahavn 1. februar 1980.

Eftir lokna útbúgving gjørdist hann politistur í Keypmannahavn, til hann 1. oktober 1986 varð settur politistur í Havn. Síðan 1. mars 1991 hevur hann starvast á kriminaldeildini.

Per er giftur við Maud, fødd Midjord, úr Havn, tey eiga dóttrina Biritu, sum er 8 ára gomul. Per eigur eisini dóttrina Mariu, sum er 20 ára gomul og býr í Danmark.

Tey hava eitt fyrimyndarligt heim í Kálvagerði í Havn. Per er sera húsligur, hann er tiltikin ordiligur og ruddiligur, tað sigst, at hann hatar støv.

Hann elskar at gera mat og er eisini kendur fyri sín góða mat umborð á sluppunum "Westward Ho" og "Johonnu" á útferðartúrum.

Per er limur í Odd Fellow felagsskapinum, og trívist hann væl saman við vinum sínum har, sum stuðla hvør øðrum á ein positivan hátt. So á ein hátt kann sigast, at múrarin gjørdist frímúrari.

## Fiskasølan í Bretlandi nýggjan stjóra

**Havnarmaðurin Birgir Kass er settur sum nýggjur stjóri hjá Faroe Seafood í Bretlandi. Samstundis flytur Faroe Seafood UK úr býnum Preston til Grimsby**

STJÓRASKIFTI

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í farnu viku bleiv havnarmaðurin Birgir Kass settur í starv sum nýggjur stjóri hjá Faroe Seafood UK, sum er skrivstovan hjá fiskasøluni í Bretlandi. Birgir avloysir Irwin Edwards, ið er farin úr starvinum.



### Nærri feska fiskinum

Í telefonini úr Onglandi greiðir Birgir Kass frá, at Faroe Seafood UK nú fer at flyta úr býnum Preston, har hildið hevur verið til í nøkur ár, til kenda fiskivinnubýin Grimsby, har Fiskasølan áður hevur havt nógv virksemi. - Á henda hátt koma vit nærri feska fiskinum, og tað verður lættari hjá okkum at koma í samband við bæði keyparar og seljarar, sigur Birgir Kass.

Í løtuni starvast fimm fólk hjá Faroe Seafood UK, men Birgir Kass sigur, at ætlanir eru um at økja um virksemið, og tá fer starvsfólkatalið óivað at vaksa, sigur hann.

Birgir Kass er 33 ára gamal og hevur starvast hjá Fiskasøluni síðani 1997. Fyrstu árini á Fiskasøluni starvaðist Birgir hjá júst Faroe Seafood UK, men seinastu fimm árini hevur hann verið á høvuðsskrivstovuni í Havn. Hann er útbúgvin eksport-teknikari.

Birgir er sonur Ernst og Eyðbjørg Kass í Havn, og hann er giftur við Beintu, dóttur Oddvá og Niels Nattestad. Tey eiga børnini Dánjal, Eyðbjørg og Johan, og fjórða barnið er væntandi í mai mánað.



## Litmyndir av brúðarpørum í Sosialurin

Vikuskiftis

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**


### Gullbrúdleyp



Sunnudagin 6. februar hava hjúnini Hjørdis og Alberg Johansen í Sandavági verið gift í 50 ár.

Tey, ið ynskja at heilsa upp á gullbrúðarparið, eru vælkomin á Nesavegi 10 eftir klokkan 18.00

### 90 ára føðingardagur

Hósdagin 3. februar fyllir Malla Berg Olsen, Toftum, 90 ár.

Dagurin verður hildin í kirkjukjallaranum í Fríðrikskirkjuni kl. 18.30

### Dagurin

**2. februar. Kyndilsmessa**. Er upprunaliga ein mariumessa og varð hildin til minnis um vitjan Mariu í halgidóminum 40 dagar eftir føðingina, sum siður var hjá jødiskum konum. Henni til minnis og barninum til heiðurs vórðu kertur og kyndlar tendraði, og av tí kemur navnið *missa candelarum*. Navnið *candela* merkir vaksljós.

*Victor Danielsen doyði hendan dagin í 1961.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu í stóru sorg okkara, tá ið kæri bróðir, svágur, pápabeiggi og abbabeiggi

**Sofus Eide,**
**Nólsoy**

andaðist og varð borin til hvíldar.

Tøkk til Hera Joensen fyri troystarrík orð í kapellinum, og tøkk til Sonju Klein og Rodmund í Liða fyri troystarrík orð í kirkjuni.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk til sangarar, berarar, kirkjutænarar og tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Eina stóra tøkk til bygdarfólk og avbygdarfólk fyri tað góða vinarband tit høvdu við hann, og sum vit so týðuliga merktu við jarðarferð hansara.
Eina hjartans tøkk til hvønn einstakan av tykkum í tí stóru mannfjøld, ið fylgdu honum á hansara seinasta ferð her á fold.

Má Harrin signa tykkum øll.

**Svenning, Bernhild, Heinina, Elisabeth og Sólbjørg við familju**